## DAGSINS MEINING

# Ongan miðvísan politikk – andstøðan má vakna

Týsdagin avdúkaði landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, at hetta landsstýrið hevur sett sær fyri ikki at reka ein miðvísan íbúðapolitikk. Hetta kom fram í svari til ein fyrispurning frá Anitu á Fríðríksmørk.

Grundgevingin hjá Sámal Peturi í Grund fyri ikki at reka ein íbúðapolitikk er hon, at fleiri íbúðir í Havnini eru í stríð við økismenningarpolitkkin hjá landsstýrinum. Men her blandar hann tvinni viðurskifti saman. Flestu føroyingar taka undir við, at vit skulu styrkja bæði útjaðaran og útoyggjarnar. Trupulleikin er bara hann, at so mong vilja til Havnar. Og tað er kanska ikki so løgið, tí í høvuðsstaðnum er arbeiði og eitt stórt útboð á øllum økjum í frítíðini.

Men grundin til, at so er, er bæði hon, at tað almenna leggur støðugt meiri virksemi í Havnini og tað sama ger privata tænastuvinnan. Tí er svarið hjá Sámal Peturi í Grund eisini í andsøgn við almenna politikkin. Skuldi landsstýrið í øllum lutum hugsa um útjaðaran, átti landsstýrið ikki sett eitt tað einasta starvsfólk afturat í høvuðsstaðnum, men flutt upp aftur fleiri stovnar út um landið. Tað ber kortini ikki til eftir stuttari tíð.

Harafturat er støðan í høvuðsstaðnum ídag, at eftirspurningurin eftir býli er so stórur, at prísurin er rokin upp. Tað merkir, at tey, sum ikki hava ráð, verða rikin út á gøtuna.V.ø.o. hevur íbúðapolitikkurin - ella vantandi politikkurin á hesum øki - eina sosiala slagsíðu. Og tað kann ikki góðtakast, tí býlið - heimið - er tað mest grundleggjandi í tilveruni.

Eitt er, at landsstýrismaðurin einki vil gera við trotið í Havnini. Men verri er, at landsstýrið hevur ongan miðvísan politikk á hesum øki sum heild. Føroyar eru ikki bara Havnin. Skulu ikki upp aftur fleiri setast aftur at koma til landið, og uppaftur fleiri gerast offur fyri íbúðaspekulatión, mugu vit stinga ein miðvísan politikk út í kortið á hesum øki.Men tá landsstýrið ikki vil gera tað, er hetta eitt upplagt evni hjá tí meiri sosialt tilvitandi andstøðuni at gera tað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fýra ymisk sløg av milliardum

**Jóhan Petur Johannesen**

Vit føroyingar hoyra javnan nakrar pástandir um milliardir. Ein av hesum pástandum er, at blokkstuðulin (eisini nevndur milliardin úr Danmark), sum er ein afturvendandi upphædd á hvørjum ári, ger okkum ikki rík. – Onkur loysingarmaður sigur beinleiðis, at hon ger okkum fátøk.

Tað næsta, sum vit hoyra er, at Landsstýrið eigur eina øðiliga upphædd í Landsbankanum. Tað sigst, at har liggja í løtuni 2,3 milliardir á kistubotninum. Allir føroyingar siga sum við ein munn, at hesar milliardirnar eru av tí slagnum, sum gera okkum rík. Eg havi enn ikki hoyrt nakran loysingarmann sagt, at milliardirnar í Landsbankanum gera okkum fátøk.

Síðani hava vit fingið nakað nýtt, sum kallast "oljumilliardir". Eingin hevur enn sæð hesar milliardirnar, og eingin veit heldur, um vit nakrantíð fara at síggja tær. Men øll tykjast at vera á einum máli um, at hesar fara at gera okkum ovurhonds rík.

Umframt alt hetta, skyldar landskassin góðar 4 milliardir. Men tær milliardirnar verða sjálvdan tiknar uppá tungu.

**Eiga tvær og skylda fýra**

Nú í skjótt 4 ár hevur verið jabbað uppí saman fyri Føroya fólki, at tað hevur alstóran týdning, at vit sleppa okkum av við tær afturvendandi milliardirnar úr Danmark, tí tær gera størri skaða enn gagn, verður sagt. Harumframt hoyra vit, at tær donsku milliardirnar eru óneyðugar, millum annað tí at vit eiga 2,3 milliardir í Landsbankanum.

Hesar 2,3 milliardirnar, sum vit hava brúkt fleiri ár um at spara saman (í bestu tíð og við nógvum blokkstuðli), skulu í fyrsta umfari koma ístaðin fyri eina heila milliard úr Danmark á hvørjum ári, og harumframt skulu tær verða við til at rinda 4 milliarda skuldina niður við.

Tað er ikki ringt at rokna út, at hetta gildið í mesta lagi kann vara í tvey ár.

Um oljumilliardirnar sigur løgmaður, at vit skulu ikki rokna við teimum, men at vit skulu liva sum um at eingin olja er. Serfrøðingar á økinum siga, at í øllum førum ganga nógv ár, áðrenn vit fáa nakra inntøku haðani.

Spurningurin er so:

1. Hvat hevði landsstýrið gjørt um tvey ár, um Føroyar blivu fullveldi nú ?

2. Hvat nyttar at eiga 2 milliardir á bók, tá vit skylda 4 ?

# Tað finst eitt samfelag uttan fyri Havnina

**(viðmerkingar til tosið um bústaðartrupuleikan)**

**Tordur J. Niclasen**
*borgarstjóri*



Frá "sakkunnleikanum" hevur ljóðað, at tørvurin á bústøðum og ansingarmøguleikum er ein tann stórsta forðingin fyri, at føroyimgar o.o. flyta til landið.

Í hesum sambandi hevur somuleiðis verið ført fram, at tað almenna átti at farið í holt við íbúðarbygging.

Tá undirforstaðið í øllum hesum tosi, tykist at vera, at íbúðarstøðan í **Tórshavn** er orsøkin til, at slíkt verður ført fram, **má talast at.**

Alment løntir sakkunnleiki, búsitandi í Havn, áttu at skriva sær aftanfyri oyrað, at tað finst ein heimur uttan fyri Tórshavn. Eitt samfelag, sum m.a. uttan nakara trupuleikar kann bjóða bæði grundstykkir og ansingarmøguleikar.

Tí er tað **heilt burtur við og beinleiðis ein ágangur ímóti bygdasamfelagnum,** at ikki verður víst á íbúðarmøguleikarnir **uttan fyri Havnina,** tá so álvarslig mál verða umrødd.

Hóast tað í dag tíanverri er ein sannroynd, at bestu møguleikarnir fyri almennum størvum v.m. eru í Tórshavn, so finnast møguleikar til búsetingar uttan fyri Havnina, og átti tí hetta ikki at verið nøkur forðing fyri, at føroyingar fluttu aftur til landið.

Við teim samferðslumøguleikum sum í dag eru, eigur tað ikki at gerast til ein trupuleika, at skula búgva einar 20-40 minuttir koyrsil frá arbeiðsplássinum.

**Tí má alt hetta snakki - enntá av sokallaðum sakkunnleika (sum býr í Havnini) um at bústaðartrupukeikarnir í Havnini, er orsøkin til at fólk ikki flytur aftur til landið, halda uppat! Í staðin eigur at verða víst á fjølbroyttu møguleikarnar, sum liggja uttan fyri høvuðsstaðarøkið!**

Tá "sakkunnleikin" tosar um almenna íbúðarbygging, so verður hugsað um, at slík bygging skal fremjast í Havnini!

Um slík almenn bygging í heilatikið skal fremjast, hví so ikki gera hetta sum eitt lið í økismenning, t.v.s. at bygdir **uttan fyri høvuðsstaðarøkið** fáa stuðul til slíka bygging ella til byggibúning av grundstykkjum??!!

Skulu Føroyar varðveitast sum eitt fjølbroytt samfelag, so má almenni mynduleikin og almentlønti sakkunnleikin broyta hugburð, ásanna og leggja seg eftir, at tað finnast møguleikar - eisini bústaðarmøguleikar - uttan fyri høvuðsstaðarøki.

Helst eru tað fleiri kommunur, sum kunnu hjálpa uppá bústaðartørvin. **Eiðis kommuna vil fegin vísa á grundstykkir sum eru til sølu - fyri ein prís, sum bert er ein lítil partur av tí, ið vanliga verður givið fyri grundstykki í høvuðsstaðarøkinum.**


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Landssjúkrahúsið – eitt vandamál

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



**Sambandsflokkurin metir, at krepputiltøkini á Landssjúkrahúsinum eiga at setast úr gildi nú.**

Vit hava ikki brúk fyri at deildir lata aftur, men upp.

Vit hava ikki tørv á longri bíðilistum, men styttri.

**Krepputiltøk sett í verk:**

Tá Landssjúkrahúsið verður illa viðfarið ídag, er tað sjúklingurin, ið verður illa viðfarin.

Tá Landssjúkrahúsið var bygt fyri nøkrum áratíggjum síðani vóru allar deildir opnar alt árið í mong ár. Tá so Føroyar fóru á húsagang vegna politiska vanstýring skuldi sparast. Og almikið varð spart - á Landssjúkrahúsinum.

Eg starvaðis á hesum arbeiðsplássi tá, og mangan var havt á orði, at fíggjarstøða landsins sá út til at skula loysast - bert við skerjingum á Landsjúkrahúsinum. Deildir skuldu lata aftur fleiri mánaðar árliga. Spariknívurin var á lofti árla og síðla. Peningur varð eisini spardur. Men samstundis komu bæði sjúklingar og starvsfólk at merkja hetta. Serliga við at bíðitíðirnar komu at gerast longri, og innleggingartíðirnar styttri. Starvsfólkið roynir enn at gera sítt besta innan øll økir, men mong hava sanna, at kreftirnar ikki megnaðu tað, ið viljin var til. Fólk rýmdu og rýma úr størvunum.

**Krepputiltøk enn í gildi á Landssjúkrahúsinum:**

Hóast vit nú eru væl á veg at koma úr 90-ara kreppuni, so eru krepputiltøkini á Landssjúkrahúsinum enn í gildi. Sjálvt í ár eru skriv send út til viðskiftafólk hjá landssjúkrahúsinum har boðini eru greið: *"eins og undanfarin ár mugu vit aftur í árinum av fíggjarávum lata seingardeildir aftur*
*t.d. er eitt skeið juni/juli/august:*
*B6: 18.06.01 - 22.07.01 - 18 seingjarpláss*
*B7: 23.07.01 - 26.08.01 - 24 seingjarpláss*
*Víðari stendur: "Vit vóna, at ikki verður neyðugt við fleiri afturlatingum. Roknast má tíverri við longri bíðitíð".*

Samstundir verður nógv tosa av leiðandi politikarum okkara um, at hundraðtals milliónir krónur eru til avlops á fíggjarlógini seinastu árini!

**B6 eindømi - ella fyrsta deildin?:**

Hóast tey á B6 hava sagt seg úr starvi vegna ótolandi viðurskiftir, so tykist torført hjá hesum at fáa leiðsluna at fata teirra púra greiða boðskap.

Vit kunnu spyrja okkum sjálvi, um viðurskiftini á B6 - eftir 10 ára krepputiltøk á øllum Landssjúkrahúsinum - er eitt eindømi, ella bert byrjanin.

Vandi er nevniliga fyri, at aðrar deildir gera tað sama, um trupulleikarnir ikki verða loystir við betri hegni, enn vit hava sæð higartil. Tí enn er ongin loysn funnin, bert 10 dagar áðrenn B6 verður afturlatin, av tí ongin sjúkrasystir er á starvi eftir 1. januar. Eftir míni hugsan, so er B 6 bert toppurin av ísfjallinum - og vandi er fyri, at hinir 9/10 koma undan kavi sum tíðin gongur - og trupulleikarnir ikki vera loystir! So her er veruliga vandi á fer innan sjúkrahúsverk okkara.

**Ein vegur úr naggatódnini:**

Sambandsflokkurin metir, at krepputiltøkini á Landssjúkrahúsinum eiga at setast úr gildi nú. Deildirnar eiga at verða opnar stórt sæð alt árið, og játtanin til deildirnar at økjast tilsvarandi.

- Tað vil gera, at bíðitíðirnar styttast, til gagn fyri sjúklingin
- at starvsfólkini fá betri arbeiðsviðurskiftir.

Tá so nógv er til av peningi, at 400 milliónir krónur av ríkisveitingini kunnu kutast burtur í einum høggi, tykist undarligt, at sjúkrahúsverkið enn er illa spert av krepputiltøkum frá 1990-unum.

Áttu hesi viðurskiftini ikki at verið fingin uppá pláss ÁÐRENN peningur til vælferðarskipanir okkara verður søplaður burtur, sum vit síggja loysingarsamgonguna gera ídag?

Góð jól - og eitt av Harranum signað nýttár.

# Tunnilsmunnar og náttúrðabitar

**Ása undir Kletti**

"Vi er på vej ind i en tunnel............................ nu er vi på vej ud af tunnelen, skat, og snart kører vi ind i en rundkørsel, skat". Nú heldur tú kanska, góði lesarari, at hetta er brot úr onkrari danskari krimi – kanska hjá Hanne Vibeke Holst, tá hon skrivar um "blomkålsdytten" í Moskva ella hjá Torben Nielsen í "Nitten røde Roser", men so er ikki. Vit sita í bussinum, sum skal vestur í Vágar – vit skulu til Danmarkar, og hetta sera gávuríka og gevandi prátið fer fram nøkur setur aftanfyri okkum. Vit vóru so dánt komin niðan til rundkoyringina beint við Smyril Line, so hendi tað: "Det er et yndigt land", "Jesus bleibet meine Freude", "Tú alfagra land mítt" – tað floymir út í bussin og inn í oyrað mitt í útvarpstíðindunum, sum ikki hava ein livandi kjans í øllum hesum meldrinum av telefonsangløgum.

"Du må hellere ta' bussen i dag og husk at ta' noget op fra fryseren til aftensmaden, før du ta'r afsted. Hej". Á ja. Her er ein jassur, sum ikki vil, at "dáman" skal brúka bilin, sum bert stendur í túninum kortini. Og sjálvandi væntar hann, at náttúrðin er komin undir land og tilgjørdur, tá hann troyttur og útlúgvaður – hann hevur jú ferðast allan dagin – kemur heim til konu og børn í Ballerup. Hetta er hann við "Det er et yndigt land". Ein er væl tjóðskaparligur, sjálvt um ein ferðast.

So er tað hin við "Jesus bleibet meine Freude". Adagio. Hóskar væl til útsjóndina. Hann sær øgiliga týdningarmikil út – kanska er hann embætismaður ella okkurt annað álvarsligt. Eg havi ein lúnskan illgruna um, at hann hevur gjørt eina avtalu við onkran, sum ringir til hansara við jøvnum millumbilum, so vit, sum bara hava hug at lata gluggarnar aftur og kanska hugsa um einki eina løtu, verða væl og virðiliga mint á, at onnur kunnu so sanniliga ikki bara leggja seg afturá- nei, nei. Tað ræður um at vera tøkur – nátt og dag. Sum danir taka til: "At være på". Gud náði tann, sum ikki "er på". Hann gerst eftirbátur og tað við lít. (Kann ikki lata vera við at hugsa um, tá menn róptu yvir um fjøll – tað var tátíðarinnar slag at fartelefon, og væl bar til).

"Har du husket at aflevere kontrakten? Nej, men altså, skat, du ved jo, at den skulle afleveres i går". Siti og durvi – nú helt eg, at friður fór at valda eina skamma stund – kanska til vit eru komin til Kvívíkar, men gakk! Sáttmálin skal gjøgnumgangast væl og virðiliga, so alt er uppá pláss og íbúðin komin undir land. So veit eg tað! Kanska kann eg onkuntíð sleppa at læna hana, tá vit eina aðru ferð fara til Danmarkar. Hvør veit.

Nú er friður eina løtu. "Tú alfragra land mítt" hevur givið skarvin yvir og er sovnaður, stakkalin. Vónandi hevur hann slókt fartelefonina (eg ivist stórliga).

Nú bíða vit bert eftir, at onkur telefon fer at ringja, og vit aftur verða partar av heimalívinum hjá viðkomandi. Kann verða eitt sindur pínligt við hvørt. Tað er ikki altíð so spennandi at gerast óviljaður partur av ósemjum á ymiskum heimabeitum. Havi sitið við døgurðaborð saman við fólki, eg ikki kendi so væl og hoyrt telefonsamrøðu – var við at fáa brúnu sósina í rangastrúpan, tá eg var vitni til - tí eg sat undir liðini á telefonprátaranum - at ávísur persónur júst var fluttur frá konu og børnum. Ikki serliga heppið. Onkursvegna hevur hetta eisini sníkt seg inn í okkara máltíðir – nú práta fólk í telefon, meðan tey eta grind og spik. Ja, mangt er forborgið.

Herfyri skuldi eg til eitt stórt tiltak, sum eg hevði glett meg til leingi. Eg hevði hampað meg eftir besta førimuni – hevði latið meg í mítt besta stás og helt, at nú kundi eg fevna alla verðina. Komin innar í forhøllina, har tiltakið skuldi fara fram, og prátið gekk av tí allarbesta, kom ávísur persónur yvir til mín at práta og stytta sær stundir Hetta var óført helt eg. Eitt gott prát um hetta og hatta, og so inn til eitt rimmar tiltak,........til fartelefonin hjá honum ringdi. Eitt, tvey trý, so fór hann spjálkandi yvir eftir gólvinum og prátaði og flákraði, so guvurin stóð í allar ættir – og har stóð eg. Kendi eg meg býtta? Gjørdist eg illa við? Ja! Havi hampiliga stórt sjálvsálit, men Gud hjálpi teimum, sum, í einari slíkari støðu, kanska ikki eru so braneggjað sum eg.

**Og so kemur tann brennandi spurningurin: "Skal eg nakrantíð hava fartelefon?** ***Neyvan!***

# Konsert i »Tilhaldinum«

**Anette Wang**



Tirsdag 18. des., hvor 25 elever fra musikskolen, nogle af dem helt små, 7-8 år, andre lidt større, spillede med en utrolig dygtighed og musikalitet. De fulgte deres lærer og dirigent Sámal Petersen, der med ligefrem besværgende krogsbevægelser fik orkestret til at yde sit bedste, efter først at have hilst med en oprejst violin i hånden ud til os gamle og vi fik en times dejlig musik lige fra Weber, Händel og Bach til gamle svenske folkemelodier og til sidst nogle af de kendte juletoner.

Det var virkelig en oplevelse.

Klaverledsagelsen havde Stamen Stantchev.

En tidligere konsert af lidt ældre elever også fra musikskolen i forrige uge var af samme lødige karat, der blev spillet i kommunuskúlanum.